Nes kommuna:

# Pensjónistar hava fingið tilhald

**Týsdagin varð skipað fyri almennari móttøku í eldrasambýlinum, Vesturskini á Toftum í samband við, at tilhald nú er latið upp í niðaru hæddini. Nógv fólk var til móttøkuna, sum var stak hugnalig við røðum, sangi, góðum smyrjibreyði og kransakøku**

TILHALD
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Fólk í Nes kommunu hava víst tilhaldinum, sum nú er latið upp í eldrasambýlinum Vesturskini á Toftum, stóran áhuga*

Eini 80-90 fólk møttu til almennu móttøkuna í eldrasambýlinum Vesturskini á Toftum týsdagin.

Skipað varð fyri móttøkuni í samband við, at tilhald nú er latið upp í niðaru hæddini í hesum góða og snotuliga bygningi, sum Nes kommuna eigur.

Løtan týsdagin var sera væl eydnað, har fólk, sum standa aftanfyri sambýlið, tilhaldið, kvinnufelagið á Toftum og Nes kommunu, søgdu nøkur orð við høvið. Prestur helt eisini eina stuttliga og hugnaliga røðu. Góðar sangkreftir í kommununi settu eisini sín serstaka dám á hesa løtu og til matna fingu tey mongu, sum komin vóru saman til høvið, bæði smyrjibreyð og kransakøku.

Meginparturin av teimum vitjandi til móttøkuna vóru pensjónistar og avvarðandi hjá pensjónistum í Nes kommunu, og haraftrat vóru umboð fyri eitt nú tað almenna, fíggingarstovnar, tryggingar og kommunur.

Tofta Kvinnufelag við Jansy Olsen og øðrum hevur saman við bygdaráðnum og leiðsluni fyri Vesturskini slóðað fyri, at tilhald nú er latið upp fyri pensjónistum.

Elin Dahl Kastalag av Glyvrum er settur leiðari við tilhaldið, og hon hevur arbeitt dúgliga við at skapa teir karmar, sum skulu verða grundarlagið undir tilhaldinum.

Í eldrasambýlinum Vesturskini fegnast tey eisini um, at tilhald nú verður í niðaru hæddini. Tey ivast onga løtu í, at hetta kemur at seta ein serstakan dám yvir húsið, har 15 fastbúgvandi fólk eru – og eitt pláss til umlætting.

Í Nes kommunu fegnast fólk eisini um góðu umstøðurnar hjá teimum eldru og gomlu, og tey halda, at eldrasambýlið Vesturskin við teimum møguleikum, sum húsið hevur, er eitt óført býli og tilhald, sum kommunan hevur skapt.

Við tilhaldinum, sum nú er latið upp í húsinum og verður opið frá klokkan 14 til 18 hvønn yrkadag, kunnu allir pensjónistar í kommmununi fáa nakað burtur úr hesi íløgu, sum kommunan hevur lagt í eldrasambýlið Vesturskin.



*Sangur og røður settu sín serstaka dám á hugnaligu móttøkuna í Vesturskini týsdagin*

# Fiskavirkir liggja still

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Ólagaliga veðrið í seinastuni hevur ført til, at fleiri fiskavirki liggja still í løtuni.

Í Miðvági hevur einki fiskaarbeiði verið seinastu dagarnar, og tá ið vit frættu í gjár, var heldur einki fiskaarbeiði á Fiskavirking í Vestmanna, Runavík og á Tvøroyri – og ivasamt var, um nakað var virkinum á Toftum og í Vági heldur.

Sum skilst, er tað ikki fiskaloysi, sum er atvoldin til, at gólvini eru turr, men í fyrsta lagi ólagaliga veðurlagið.

Haraftrat kemur, at nógvur fiskur framvegis fer óvirkaður av landinum, og her er tað serliga bretski marknaðurin, sum yvirbjóðar føroysku virkini.

Á virkinum hjá Fiskavirking í Miðvági, har hýsa er høvuðsrávøran, vænta tey, at fyrsti arbeiðsdagurin í hesi vikuni verður fríggjadagin.

- Vit hava keypt nakað av hýsu í vikuni, men talan er um smáar nøgdir higartil, sigur Jason Johannesen, virkisleiðari.

Zjawa-IV:

# Polskur seglbátur á Havnini

**Seinnapartin týsdagin kom seglbáturin, Zjawa-IV, sum er heimahoyrandi í Gdynia í Póllandi, á Havnina. Umborð eru 13 fólk, 10 menn og tríggjar kvinnur**

SIGLING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Zjawa-IV loysti úr Gdynia i mai og hevur siglt longu leiðina til Kanada og síðani um Grønland og Ísland til Føroya.

Túrurin úr Vestmannaoyggjunum til Føroya tók fýra samdøgur, og umborð á bátinum siga tey, at veðrið á leiðini heim úr Íslandi ikki var nakað serligt.

Men hetta eru ivaleyst sjóvand fólk, og vit skiltu, at bert okkurt av konufólkunum høvdu havt sjóverk.

Tá ið vit hittu manningina, sum júst hevði lagt til bryggju, spurdu tey, um vit vistu onkran, sum kundi hjálpa teimum at umvæla eitt av seglunum, sum hevði fingið skaða á leiðini heim úr Íslandi.

Zjawa-IV er 19 metrar langur. Báturin er bygdur úr timbri í Svøríki í 1949.

## Aftur til Póllands

Ætlanin hjá pólsku manningini var at fara úr Føroyum umvegis Orkneyoyggjarnar og Hetland til London, men nú er so nógv útliðið, at seglbáturin fer beina leið til London, tá ið viðrar.

Sum skilst, hevur manningin skift nakrar ferðir, síðan loyst varð úr Gdynia í mai og onkur, sum var við á ferðini til Føroya, var komin umborð í Íslandi.

Øll manningin umborð á Zjawa-IV er úr Póllandi, men onkur býr í London.

Úr London ber leiðin aftur til heimlandið, har tey væntast at verða í Gdynia einaferð í oktober.




*Veðrið á leiðini heim úr Íslandi hevði ikki verið nakað serligt hjá teimum 10 monnunum og trimum kvinnunum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*